# Bjóða 10. flokki á MiðRás

**Kapping er í Tórshavnar kommunu um næmingarnar í 10. flokki, nú Tórshavnar Kommunuskúli eisini bjóðar næmingum eitt 10. flokstilboð, sum tey kalla MiðRás**



SKÚLI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað var eftir at Fiskimálaráðið hósdagin steðgaði ætlanini hjá Tórshavnar Býráð at savna allar tíggjundaflokkarnar í Eysturskúlanum, at til bar hjá Tórshavnar Kommunuskúla eisini at bjóða næmingum í 10. flokki eitt tilboð.

Nógv kjak hevur verið um avgerðina hjá Tórshavnar Býráð at savna allar 10. flokkarnar í Eysturskúlanum. Serliga hava tað verið lærarar, foreldur og næmingar úr Kommunuskúlanum, sum hava gjørt vart við seg - og skúlastýrið fyri Kommunuskúlan hevur kært málið, og tað er henda kæra, sum fyribils hevur steðgað ætlanini hjá Tórshavnar Kommunu.

Kortini hevur Eysturskúlin boðað frá, at skúlin bjóðar sama - Nám-X - sum ætlað, og nú boðar Kommunuskúlin frá, at hann eisini hevur eitt tilboð, sum tey nevna MiðRás.

Í einum faldara, sum Kommunuskúlin hevur gjørt, verður greitt frá, at tú skalt velja tvær breytir á **MiðRás**. Breytirnar liggja týs– og hósdag. Mána– og mikudagar eru valfak.

**Breytapakki 1** er miðlabreyt, ítrótta– og heilsubreyt, handverkabreyt, tónleikabreyt, náttúruvísindabreyt ella handarbeiðs- / design og mótabreyt.

**Breytapakki 2** er KT-breyt, myndlistabreyt, húsarhaldsbreyt, lestrarbreyt, sjóvinnubreyt ella landbúnaðarbreyt.

Uttan mun til hvørja breyt, tú velur, eru evni og vitjanir knýtt at. Teirra millum eru íverksetan og onnur skeiðstilboð.

**Valfakini** eru føroyskt, enskt/Cambridge, danskt, týskt, spanskt, støddfrøði, alisfrøði, evnafrøði, søga/samtíð, heimspeki/sálarfrøði, kristni/ lívsvirði og lívfrøði/umhvørvi.

Fríggjadagar eru tiltøk ella framførslur á skránni.

10. flokkur í Kommunuskúlanum fer tríggjar lestrarferðir. Í heysthálvuni fara øll lesandi á **MiðRás** samansjóðingarferð. Í várhálvuni verður farið enn eina ferð í Føroyum. Í várhálvuni verður eisini farið á lestrarferð út í heim. Leiðin liggur til **Prag** umvegis **Berlin**.

Á **MiðRás** í Kommunuskúlanum eru tvær serskipanir. Onnur er til tónleikarar í **MusikkskúlaMiðnámi** og hin er **parttíðarstarv** í vinnuni, sum eru tvinnað við **MiðRásina**.

**MiðRás** húsast í sunnara vongi í gula skúla. Her eru undirvísingarhøli, felagshøli, vesi, køkur, bókasavn og gongsteldur. Næmingarnir á **MiðRás** hava fría atgongd til tráðleysa netið hjá skúlanum í skúlatíðini.

- MiðRás er rásin til tín, ið vil verða partur av tí besta skúlaárinum. Árið, har tú finnur teg sjálva/n og nýggjar vinir, búnast og mennist, sigur Kommunuskúlin í faldaranum.


## Floksting 2010 19. og 20. mars í Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna

## – Nýbrot í burðardygd, javnstøðu og búskapi

**Fríggjadagur 19. mars**

19.00: Aðalstjórnarformaðurin setir tingið
19.10: Tingið skipar seg við tingformanni, tingskrivara og yvirlýsingartoymi
19.20: Grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram til góðkenningar
20:30 Umrøða av innkomnum uppskotum og atkvøðugreiðsla
22.00: Val av starvsnevnd, grannskoðarum og tiltakslimum
22.30: Frágreiðing frá Unga Tjóðveldinum
23.00: Tingið niðurlagt

**Leygardagin 20. mars**

08.30: Morgunmatur
09.00: Kvøður frá samstarvsflokkum í Íslandi og Grønlandi
09.15: Formansfrágreiðing
10.00: Politiskt orðaskifti um formansfrágreiðing og politisku mál floksins
12.00: Matarsteðgur
13.00: Tilfeingisbúð – uppskot og viðger av fiskivinnureformi Tjóðveldisins
14.00: Orðaskifti um fiskivinnureform Tjóðveldisins
15.00: Kaffisteðgur
15.30: Orðaskiftið heldur fram
17.15: Atkvøðugreiðsla um fiskivinnureform Tjóðveldisins
17.30: Yvirlýsing
19.30: Tjóðveldisveitsla á Bryggjuni í Vestmanna,

**Tekning til veitsluna fer fram hjá Heina Holm á tel. 21 25 23. Kostnaður er kr. 300 fyri hvønn**

TJÓÐVELD